## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TILBÚGVING OG PUBLIC SERVICE

Eldurin umborð á Athenu hevur rættiliga sett fokus á tilbúgvingina her á landi, og tað var eisini evnið, sum útvarpið hjá Kringvarpinum tók upp í Bismaranum mánadagin.

Kringvarpið er partur av almennu tilbúgvingini, og soleiðis eigur Kringvarpið fram um aðrar miðlar at verða ein beinleiðis aktivur partur í eitt nú slíkari tilbúgving, sum fór fram næstsíðstu mánanátt, tá skálafólk vórðu evakuerað á miðari nátt.

Men so var ikki, og vit skulu ikki á hesum stað viðgera orsøkina til, at almenni miðilin ikki er ein aktivur partur – tað kunnu vera viðurskifti, sum stovnurin sum so ikki hevur ávirkan á.

Men tíðindadekningurin av eldinum á Athenu vísir kortini, at vit hava eina heilt aðra miðlamynd í dag í mun til bara fyri fáum árum síðani, tá útvarp og sjónvarp var alt. Stutt eftir at boðað varð frá eldinum, varð skrivað um hann á fleiri netsíðum, eitt nú á Portalinum og á dimma.fo. Vit royndu at fylgja við sum frægast við góðum fólki á staðnum. Tað var tí heldur ikki av ongum, at løgreglan ringdi til blaðstjóran um hálvgumfimmtíðina um morgunin fyri at fáa okkum á Portalinum at boða frá, at neyðugt varð at evakuera skálafólk. Og tá slík boð koma, so gera vit tað sjálvandi fegin, tí hóast vit á pappírinum ikki eru partur av tilbúgvingini, so vilja vit sjálvandi veita eina hjálpandi hond í slíkum støðum.

Og tað er ein veruleiki, at privatu miðlarnir eru langt framman fyri almenna skattafíggjaða Kringvarpið, tá tað snýr seg um at skriva tíðini í úrtíð. Fyrr hevði útvarpið tíðindasendingar um kvøldið, men tað er skorið burtur, soleiðis at seinastu tíðindini eru klokkan 18 – og um vikuskiftið verður blussið skrúvað langt niður.

Tí er tað so natúrligt, at løgreglan klokkan hálvgum fimm ein mánamorgun hevur munandi lættari við at fáa Sosialin at leggja eini slík boð út á Portalin, heldur enn at fáa Kringvarpið at tendra fyri senditólunum í Sortudýki.



Hevði Kringvarpið kunna brúkt orkuna upp á at kappast við privatu miðlarnir um tíðindapartin – og at vera klár í eini tilbúgvingarstøðu, heldur enn at brúka almennar skattakrónur at dumpa lýsingarprísir fyri at skræða fíggjarliga grunddarlagið undan privatu miðlunum, so hevði nógv verið vunnið.

Løgregla, Tilbúgvingarstovnur, sløkki- og bjargingarlið kring landið skulu vita, at vit altíð eru fús at veita teimum eina hond, um boð eru eftir okkum – nátt sum dag!

**Løgreglan fekk boð um evakuering út gjøgnum Portalin**

## Bobby Bare á Summar Festival

Amerikanski country-sangarin Bobby Bare, sum sang tiltiknu orðini (hoyrið hann her!) »I wanna go home«, verður við á Summar Festivalinum í ár.



I wanna go home. Hesi ódeyðiligu orðini sang Bobby Bare í 1963, og síðani hava fólk kring allan heimin sungið við. Detroit City, sum sangurin kallast, er ein av kendastu country-sangum yvirhøvur, og hann ljóðar eisini heimligur her á okkara leiðum.

Bobby Bare royndi í fimmtiárunum at vinna fram innan tónleikin, men tað var ikki fyrr enn fyrst í seksti árunum, at hann av álvara fekk sítt gjøgnumbrot. Tað var millum annað við stóra hittinum Detroit City, og seinni komu sangir sum 500 Miles Away From Home, Four Strong Winds, Talk Me Some Sense og fleiri.

Bobby Bare spældi eisini duettir inn, og ein av teimum mest kendu er A Dear John Letter, sum hann spældi saman við Skeeter Davis.

Sonurin Bobby Bare jr. er eisini virkin tónleikari, og hann byrjaði tíðliga at syngja saman við pápa sínum. Miðskeiðis í sjeyti árunum høvdu teir eitt stórt hitt við sanginum Daddy What If, og tá var yngri Bobby bert fimm ára gamal. Bobby Bear jr. spælir framvegis nógv saman við pápa sínum.

Bobby Bare er framvegis virkin tónleikari. Hann er væl fyri og framførir nógv á konsertum.

Nú hevur livandi legandan játtað at koma til Føroya at spæla fyri fyrstu ferð, og tað verður ikki meira ektað og meira country, enn tá Bobby Bear fer á pallin á Vágsbøi.

## Portalurin setti met

Seinastu vikuna setti www.portal.fo met í vitjandi. Líka síðani vevmátingarlistin hjá byrja at telja vitjandi á internetinum fyri nøkrum árum síðani, hevur Portalurin altíð ligið ovastur. Hann er Føroya nógv mest vitjaða heimasíða. Tá serstakar hendingar eru, ger hann vanliga eitt lop uppeftir, og helst hevur Athenaeldurin havt sína orsøk til, at talið av brúkarum vaks við níggju prosentum. Seinastu vikuna var talið av brúkarum (serstakar IP-adressur) 78.765.

Tá tosað verður um lesaratøl og lurtaratøl eru prosenttølini vanliga lág – nærkast eitt blað 30 ella 40 prosentum, so stendur sera væl til. Men Portalurin kann tí fegnast um at hava lesaratøl, sum líkjast 160 prosentum – og tað man vera eindømi, at ein heimasíða javnt og samt verður so nógv vitjað.

Talið av vitjandi uttanlands var í síðstu viku 28,4 prosent av hesum.

Hesir sløku 80.000 brúkararnir lósu 2.552.724 síður á Portalinum í síðstu viku.



**Er kips mannaføði?**

JÁKUP PETERSEN
KJAK Á SÍÐU 14



**Internetsensurur?**

KJAK Á SÍÐU 10

## Føroysk list í London

Í eini roynd at røkka út í heim við føroyskari list, skipar bólkurin List í London fyri eini framsýning í London í mai í ár.



– Av tí, at hetta er at bróta upp úr nýggjum, hava vit í fyrstu syftu valt at fara út við einum listarfólki, í hesum førinum við verkum av Amariel Norðoy, sigur Eyðu Waagstein, sum er projektleiðari.

Í samstarvi við føroysku sendistovuna í London, er komið fram til eitt gallarí í Wimbledon Village, Wimbledon Fine Art, www.wimbledonfineart.com

Amariel Norðoy og Eyðun Waagstein vóru 20. mars til eina fernisering, og til samráðingar við eigaran av gallarínum, Andrew Stoppani. Ein avtala við hetta gallarí er komin undir land. Framsýningin verður 22. mai og tvær vikur fram.

Ein avtala er gjørd millum Sendistovuna og Scandinavian Magazine um at hava eina grein um átakið í mai-útgávuni av blaðnum. Harafurat koma tíðindafólk frá blaðnum til Føroyar í summar. Ætlanin hjá Scandinavian Magazine er so at gera eina greinarøð á 26-27 síður um føroyska mentan, vinnulív og ferðavinnu. Hetta verður til desemberútgávuna hjá Scandinavian Magazine.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo